Maritime karrieremuligheder i herning shipping

Dæks- og Maskinofficerer samt Aspiranter



herning shipping afholder præsentationsmøde tirsdag den 16. september kl. 10.00 på Hotel Hafnia, Tórshavn, med efterfølgende mulighed for at få en uforpligtende samtale med rederiet. herning shipping vil også være tilstede på Hotel Hafnia onsdag den 17. september fra kl. 09.00 - 14.00.

Kom og hør om dine karrieremuligheder til søs!

WORLD CAREERS™

Som led i vor løbende udvidelse af Rederiets tonnage tilbyder herning shipping gode karrieremuligheder i Rederiets DIS-registrerede flåde.

For yderligere information kontakt Kasper Juul-Schirmer på tlf. +45 2969 8419 eller via mail crew@herning-shipping.com.

herning shipping a.s. driver international rederi- og mæglervirksomhed og disponerer over 40 tankskibe. Rederiet beskæftiger ca. 400 medarbejdere - 350 til søs og omkring 60 i administrationen i Danmark, Frankrig og Singapore. Rederiet har godkendt kvalitetsstyringssystem i henhold til ISO 9001, ISO 14001, ISM, GMP + HACCP samt OHSAS 18001. Alle certifikater er udstedt af Lloyds register Quality Assurance for såvel skibe som administrationen.

herning shipping

Wellness.fo

letur upp týsdagin 9. september kl. 12.00

Móttøka verður týsdagin kl. 14.00-17.00
Øll eru hjartaliga vælkomin!

Galvanic Spa: reinsan, tonic, Galvanic Spa, serum, dag- og eygna creme.
30 min: 250,-
8 Kurviðgerðir: 1.698,-
Upplatingartilboð: kr. 998,-
Galdandi frá 9.-12. sept.

Luxus Aroma Facial: Húðgreinan, reinsan, tonic, peeling, damp, djúbdareinsan, rættan og litan av brúm, Galvanic Spa, mýking v.m. Viðgerðin endar við løttum dag make-up.
105 min: 580,-
Køtilboð: kr. 300,-
galdandi fyri 10 tey fyrstu

Pure Facial: Húðgreinan, reinsan, tonic, peeling, damp, djúbdareinsan, rættan av brúm, mýking v.m. Viðgerðin endar við løttum make-up.
90 min: 450,-
Køtilboð: kr. 250,-
galdandi fyri 10 tey fyrstu

Wellness-pakki: Pakki við Epoch Antiseptic Hand Sanitizer, Celltrex Ultra, NaPCa Moisture Mist.
Vanl. prísur: 526,-
Upplatingartilboð: kr. 259,-

Body Collection: Liquid Body Bar, Liquid Body Lufra, Perennial Intense Body Moisturizer, AP-24 Fluoride Toothpaste, 4-in-1 shampoo (Condition, Hydrate, Protect) og Firewalker Relaxing Foot Cream.
Vanl. prísur: 685,-
Upplatingartilboð: kr. 499,-

Fótarøkt: Liquid Body Lufra og Epoch Sole Solution.
Vanl. prísur: 264,-
Upplatingartilboð: kr. 199,-

Galvanic Spa maskina – startpakki: Maskina, Creamy Cleansing Lotion, pH Balance Toner, 2 pk. Galvanic Spa Pre-Treatment and Treatment Facial Gels (til 8 viðgerðir) og Moisture Restore Day SPF 15.
Vanl. prísur: 2.999,-
Køtilboð: kr. 2.500,-
galdandi fyri 10 tey fyrstu

Opið er:
Mán. - hós. 11.00-17.30
Fríggjadag 11.00-19.00
Leygardag 11.00-14.00

Grafikmaster | tel. 227 000

wellness.fo
...tín leið til vælveru!

v/Martin D. Brodersen & Elisabeth Petersen
Áarvegur 4 · Tórshavn · Tlf. 223312 / 583469
wellness@wellness.fo · www.wellness.fo

STARVSLÝSING

Maskinlærlingur

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja 1. okt. 2008.

Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya handverkarafelag/ Landsfelag handverkaranna og Føroya arbeiðsgevarafelag/Føroya handverksmeistarafelag. Lærutíðin er fýra ár og endar við sveinaroynd.

Vanligt koyrikort er neyðugt.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella til

Landsverk
postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. sep. 2008. Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, tlf. 540 950, ella Asbjørn Johannesen, smiðjumeistara, tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleika-uppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herímillum tyrlupallar.

MASKINVERKFRØÐINGUR og STERKSTREYMSVERKFRØÐINGUR

Innan framleiðsluna og býtisvirkini hjá SEV er Verkfrøðingadeildin sjálvstøðug deild, har yrkini maskin-, byggi- og el-verkfrøði eru umboðað. Á deildini starvast 7 verkfrøðingar. Deildin stuðlar undir alt virksemi innan tøkniliga partin av SEV, ið fevnir um framleiðslu, rakstur, innlegging og eltøkni.

SEV stendur frammanfyri nógvum spennandi avbjóðingum innan hesi økir. SEV arbeiðir við eini 10 ára ætlan, ið umfatar ný- og útbyggingar innan vatn-, vind- og termiska orku, eins og innan býtisvirkini, og vera verkfrøðingarnir sjálvsagdir partar av hesi ætlan.

At fylgja við í tøkniligu menningini og velja, íverkseta og taka í nýtslu nýggja útgerð er partur av arbeiðsuppgávunum hjá verkfrøðingunum. Verkfrøðingarnir vísa til leiðaran á Verkfrøðingadeildini, men arbeitt verður eisini í tvørgangandi verkætlanarbólkum og toymum.

Vit sóknast eftir einum maskinverkfrøðingi og einum sterkstreymsverkfrøðingi, sum báðir eru nærlagdir, álítandi og hava góð samstarvsevnir.

Maskinverkfrøðingurin
Vit ynskja, at tú hevur útbúgving sum maskinverkfrøðingur. Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur kunnleika til og royndir við:

- 2- og 4-takts motorum, vatnturbinum og vindmyllum.
- brenni- og smyrjievnum.
- viðlíkahaldsskipanum og øðrum stýriskipanum.

Sterkstreymsverkfrøðingurin
Vit ynskja at tú hevur útbúgving sum sterkstreymsverkfrøðingur. Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur kunnleika til og royndir við:

- háspenningsútbúnaði so sum avbrótarar, transformarar, generatorar og releverjur til hesar.
- projektering og íverksetan av elútbúnaði til elverk og koplingarstøðir.

Fyri bæði størvini er galdandi, at royndir við útbjóðing eru góð barlast at hava.

Hevur tú hug at taka av eini av hesum avbjóðingum, er tú vælkomin at senda umsókn við prógvum og øðrum til SEV.

Freistin at søkja er mikudagin 17. september 2008.

Størvini eru lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya.

Hevur tú spurningar, er tú vælkomin at ringja til Finn Jakobsen, deildarstjóra á telefon 346800.

SEV
ELFELAGIÐ SEV
Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn